## Pappa Ulf gevur fløgu út

**Í næstum kemur nýggj fløga út og tað er Ulf V. Nolsøe, ið stendur aftanfyri útgávuna**

TÓNLEIKUR

*Dagfinn Olsen, dagfinn@sosialurin.fo*

Nýggj fløga er á veg á føroysku handilshillarnar. Tað er Ulf V. Nolsøe úr Vági, sum gevur úr. Hann býr í Danmark, har fløgan eisini er innspæld.

Fløgan nevnist Pappa Ulf - Nara Dig. At talan er um andaligan tónleik sæst á heitunum á løgunum, sum til dømis Namnet Jesus, Nära Dig, The Holy spirit told Me og Nærri mín Gud til tín.

Fleiri av løgunum er kend frá øðrum, men Ulf eigur sjálvur orð og løg til eini fýra av teimum 13 løgunum.

Ulf er komin til Føroya fyri ólavsøku og byrjar útbreiðsluna av fløguni suðuri í Vági og síðani gongur leiðin til sølubúðir í restini av landinum, so til ber at ogna sær fløguna ein av komandi døgunum.

# Tekstil í Gallarí Oynni

**Rita Mortensen sýnir í hesum døgum fram tekstillist í Oynni á Tvøroyri**

LIST

*Dagfinn Olsen, dagfinn@sosialurin.fo*

Sunnudagin fóru hurðarnar upp fyri einari nýggjari framsýning í Gallarí Oynni á Tvøroyri. Og hesaferð er talan um list í tekstil. Listakvinnan Rita Mortensen úr Danmark sýnir fram.

Og talan er um list á høgum støði og ein sær beinanvegin sum leikfólk, at her eru nógvir tímar farnir til hvørt einstakt listaverk.

Sera vakurt og hugtakandi. Myndevnini eru úr hugaheiminum, úr ævintýrum hjá H.C. Andersen, úr Grønlandi og Føroyum og annars eru ymsar náttúrulýsingar.

Litirnir eru spælandi og glógvandi, men tó eru verkini sum heild væl samansett, so heildin er dempað og innbjóðandi til nærri njótilsi.

Rita Mortensen er útbúgvin innan tekstil frá 1957 til 1960. Síðani 1993 hevur hon starvast fulla tíð sum listakvinna innan tekstil. Hon er limur í listabólkinum Quilte Qunstnerne.



*Rita Mortensen arbeiðir við tekstil og spennandi list kemur burturúr. Verk hennara eru at síggja í Gallarí Oynni á Tvøroyri í hesum døgum*

*(Mynd: D.Olsen)*

Hon hevur havt mangar framsýningar síðani 1988 í mongum ymsum londum. Sjálvandi nógvar framsýningar í Danmark, men eisini t.d. í USA, Fraklandi, Onglandi og í Japan.

Rita Mortensen hevur prýtt ymisk støð og bygningar, t.d. í Danmark, Grønlandi, Kekkia og Sveis.




Vika 31, 2004
www.kaupthing.fo

# Amerikanski búskapurin er vorðin sjálvberandi

Týdningamesta hendingin í farnu viku, sum ávirkaði virðisbrævamarknaðirnar, var røðan hjá amerikanska tjóðbankastjóranum Allan Greenspan til kongressina mikudagin. Røðan fekk, serliga stuttu, lánsbrævarenturnar at hækka, meðan partabrøvini hækkaðu nógv, fyri dagin eftir at lækka aftur, so tey í dag liggja áleið sum fyri viku síðan.

Seinastu vikurnar hava verið merktar av verri búskapartølum, ið millum annað siga, at færri arbeiðir verða sett á stovn og at kjarnuprísvøksturin er fallin. Hetta hevur elvt til gitingar millum íleggjarar um, hvørt búskaparvøksturin í USA er um at hasa av og at fráboðaðu rentuhækkingarnar fara at draga út.

Óvissan í marknaðinum, sum hevur fingið bæði partabrøv og lánsbrævarentur at falla seinastu seks vikurnar, er minkað eftir røðuna hjá amerikanska tjóðbankastjóranum. Hann gjørdi greitt, at veiku búskapartølini í seinastuni, einans verða mett av tjóðbankanum sum nattúrlig sveiggj og broyta ikki áskoðan teirra á samlaðu myndina. Teir meta, at amerikanski búskapurin nú er farin inn í eitt tíðarskeið, har hann er vorðin sjálvberandi og tískil ikki hevur tørv á framhaldandi stimbrandi inntrivum, eitt nú at rentan verður hildin niðri.

Rentuhækkingarnar fara framvegis at fara hóvliga fram og teir halda fast um at amerikanska rentan um árskifti verður 2,25%, men gera samstundis greitt, at um prísvøksturin gerst ein trupulleiki vilja teir ikki himprast við at taka neyðugu stigini. Hóast greiðu støðu Greenspans eru partabrævaíleggjarar meiri svartskygdir, sum mótrørslan í farnu viku bar boð um. Orsøkin er millum annað tann hækkandi rentan og tann høgi oljuprísurin, ið nú nærkast støðinum undan flógvakrígnum.

Hóast stóra vøksturin í fronsku smásøluni í juni, minkaði tann italska smásølan, so útlitini fyri øktari nýtslu í Evropa minkaði og harvið eisini sannlíkindið fyri eini rentuhækking á okkara leiðum áðrenn árskiftið.

Hesa vikuna verða brúkaraálitistøl bæði fyri USA og Europa kunngjørd, sum kunnu ávirka virðisbrævamarknaðirnar. Roknskaparkunngerðir frá millum annað Coca Cola og Daimler-Chrysler, kunnu serliga fáa ávirkan á partabrævamarknaðirnar.

Rentur

| | Renta | +/- %-stig |
|---|---|---|
| Diskonto | 2,00% | 0,00% |
| 2 ára lánsbræv | 2,69% | 0,10% |
| 5 ára lánsbræv | 3,76% | 0,07% |
| 10 ára lánsbræv | 4,39% | 0,05% |

Partabrævavísitøl

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| KFX, Danmark | 262,6 | -2,6% |
| OMX, Svøríki | 670,0 | 0,6% |
| Eurostoxx 50, Evropa | 2.674,7 | -0,9% |
| S&P 500, USA | 1.086,0 | -1,4% |

Íløgufeløg

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| Lánsbrøv í DKK | 105,12 | 0,0% |
| Evru Lánsbrøv | 165,79 | 0,1% |
| Norrøn Partabrøv | 76,29 | -1,2% |
| Altjóða Vøkstur | 60,61 | -1,3% |

Gjaldoyru

| | Kursur | +/- % |
|---|---|---|
| USD | 611,69 | 2,4% |
| EUR | 743,56 | 0,0% |
| GBP | 1.124,72 | 0,8% |
| NOK | 87,38 | -0,2% |

*Renta og kursir kl. 10 í gjár. Broytingar eru útroknaðar í mun til fyri viku síðan.*



# Fiskidagarnir á Føroya Banka skerjast eini 10%

**Alfred Olsen, næstformaður í vinnunevndini, sigur, at Bankin skal eisini friðast einar 4-6 vikur í gýtingartíðini**

FØROYA BANKI

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Fiskidagarnir á Føroya Banka verða skerdir nokk so fitt komandi kappingarár. Somuleiðis skal Bankin friðast í gýtingartíðini.

Alfred Olsen, næstformaður í vinnunevndini hjá løgtinginum, sigur, at samgongan er greið yvir, at trýstið á Føroya Banka er ov hart og at tað verður neyðugt at skerja fiskidagarnar.



Henrik Old, formaður í vinnunevndini, segi herfyri í Sosialinum, at Føroya Banki er so illa fyri, at tað rættast hevði verið at friða hann fullkomiliga eitt ár ella tvey.

Men hann var eisini greiður yvir, at hetta var at kalla ógjørligt at fáa eina politiska semju um.

Men í øllum førum mælti hann til at skerja fiskidagatalið munandi.

Fiskidaganevndin hevur mælt til at skerja dagatalið á Føroya Banka 10%, men tað helt Henrik Old munaði alt ov lítið.

Næstformaðurin í Føroya Banka ásannar eisini, at Føroya Banki verður ikki friðaður.

Fiskidagarnir skulu ásetast nú og sjálvsagt hevur samgongan tosað saman um, hvussu farast skal fram.

Alfred Olsen sigur, at talan verður um ein hampiliga stóran niðurskurð á Føroya Banka komandi fiskiár, sum byrjar 1. september.

Hann sigur, at niðurskurðurin fer at liggja um tey 10%, sum fiskidaganevndin hevur mælt til.

– Tað vænti eg, at politisk semja verður um, soleiðis sum landið liggur, sigur hann.

Hann sigur, at somuleiðis verður Føroya Banki friðaður einar 4-6 vikur í gýtingartíðini.

At friða Bankan í 4-6 vikur, er eisini ein skerjing, sum bøtir um støðuna.

Næstformaðurin í vinnunevndini sigur, at samgongan er greið yvir, at trýstið á Føroya Banka er alt ov hart í løtuni og at tað verður neyðugt at seta skerjingar í verk.

Annars sigur hann, at fiskidagarnir á landleiðini verða eisini skerdir eitt sindur.

# Fær ongar avleiðingar fyri meg

**Jógvan á Lakjuni er púra vísur í, at tað fer ongar avleiðingar, at hann hevur gjørt Hans Johannus á Brúgv til stjóra á samanlagda sjómanna- og maskinmeistaraskúlanum**

STARVSSETAN

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

– Hetta fer ikki at fáa nakrar sum helst avleiðingar fyri meg.

Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, er púra vísur í, at hann situr púra tryggur í starvinum, hóast hann gjørdi Hans Johannus á Brúgv til stjóra á samanlagda sjómannaskúlanum og maskinmeistaraskúlanum.

Setanarnevndin, sum fyrireikaði starvssetanina metti, at tveir umsøkjarar vóru skikkaðir til starvið: Hans Johannus á Brúgv og Gestur Hovgaard.

Men hon metti, at Gestur Hovgaard var betri skikkaður og innstillaði sostatt hann sum nummar eitt.

Men landsstýrismaðurin gjørdi kortini av at seta Hans Johannus á Brúgv í starvið.

Hetta hevur fingið fleiri at bera hetta málið saman við eina aðra, tiltkina starvssetan, nevniliga málið, tá ið landsfornfrøðingurin varð settur í starv. Tá fylgdi Annlis Bjarkhamar, sum tá var landsstýriskvinna í mentamálum, heldur ikki setanarnevndini og tað kostaði henni embætið.



*Leiðsluroyndirnar hjá Hans Johannus á Brúgv gjørdu munin og tí gjørdi eg hann til stjóra á samanlagda sjómanna- og maskinmeistaraskúlanum, sigur Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður*

### Onki skeivt gjørt

Jógvan á Lakjuni vil ikki samanbera hesi bæði málini.

Tað einasta, hann er vísur í, er, at hann hevur púra onki skeivt gjørt.

Tað hevur hann eisini fingið trygd fyri frá løgfrøðingum.

– Tað er landsstýrismaðurin, sum setir starvið og tað ger hann einsamallur. Og so leingi hann setir starvið út frá sakligum fortreytum, er onki at finnast at.

Landsstýrismaðurin sigur at av tí, at talan er um eitt persónsmál, sum er fevnt av tagnarskyldu, kann hann ikki koma inn á smálutir í málinum.

Tí vil hann heldur ikki siga, hvør varð innstillaður, sum nummar eitt.

Men hann sigur, at setanarnevndin gav hon tvey nøvn, sum hon metti vóru skikkað at røkja starvið.

– Tað taki eg sum um at eg fái tvey nøvn at velja ímillum og eg havi so gjørt tað, eg havi fulla heimild til og tað er at velja annað burturúr.

Hann sigur, at tað, sum hann serliga legði dent á, tá ið hann setti starvið, vóru leiðsluroyndir og tí gjørdi hann av at seta hans Johannus á Brúgv í starvið.

Hann vísur á, at tað er landsstýrismaðurin, sum setir starvið og sum hevur ábyrgdina av starvssetanini.

– Skulu setanarnevndir fylgjast treytaleyst, er tað ongin orsøk til at tað skal vera landsstýrismaðurin, sum setir starvið. So kann tann myndugleikin bara liggja hjá setanarnevndini eisini, leggur hann afturat.

## Sumbingar og tvørafólk tosa víðari um samanlegging

KOMMUNUSAMANLEGGING

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tvøroyrar Býráð og Sumbiar Kommuna fara nú at tosa um at leggja kommunurnar saman.

Tað varð avrátt á fundi ímillum bæði kommunustýrini sunnudagin.

Herfyri samtykti bygdaráðið í Sumba at taka stig til at fáa kommunurnar í oynni lagdar saman í eina kommunu. Í tí sambandi vart fingu allar kommunurnar innbjóðing um at koma á fund at tosa um samanlegging.

Men av øllum kommununum í Suðuroy, var tað bert Tvøroyrar kommuna sum var sinnað at fara á fund at tosa um kommunusamanlegging.

Sunnudagin var fundur ímillum Sumbiar og Tvøroyrar kommunu um samanlegging. Og á tí fundinum var semja um, at einasta gongda leið fyri Suðuroynna er at leggja Suðuroynna í eina kommunu.

Tvøroyrar Býráð og Sumbiar bygdaráð samtykti á fundinum at nú skal hvør kommuna sær meiri nágreiniliga viðgera spurningin um at leggja Sumbiar- og Tvøroyrar kommunu saman.

Eftir summarfrítíðina skal so málið takast uppaftur, sigur borgarstjórin á Tvøroyri, Kristin Michelsen, í einum tíðindaskrivi.

## Hugnakvøld í viðarlundini á Tvøroyri

HUGNAKVØLD

*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Ólavsøkuaftan, mikudagin, verður hugnakvøld í viðarlundini á Tvøroyri. Klokkan 17 verður tann stóra grillin tendrað og har kunnu fólk so steikja tað, teimum lystir. Fólk hava sjálvi tað við, sum tey ætla at steikja.

Ætlanin er eisini at hava Grønu Sangbók við.

Men tað verða eisini ross inni í viðalundini hetta kvøldið og tá ber eisini til hjá børnunum at sleppa ein túr á hestbaki.

Hetta er eitt tiltak, sum hevur verið í fleiri ár og har plaga heilt nógv fólk at koma saman.